# 295.000

**Hetta er tað, sum Nes kommuna selur grundøkini fyri við Lýðarsveg á Toftum. Grundøkini eru púrasta klár at byggja á, og við í kostnaðinum eru øll íbindingargjøld**

Vilmund Jacobsen

295.000 krónur fyri eitt grundøki, har klárt er at seta formarnar á.

Er tað nógv – ella er tað lítið?

Tað veldst ivaleyst um fíggjarligu orkuna hjá tí, sum ætlar sær at byggja, og tað veldst ivaleyst eisini um útlitini fyri at fáa eina sethúsaogn fíggjaða í einum peningastovni.

Í høvuðsstaðarøkinum hevði hetta verið eitt rættiliga bíligt byggiøki – ja, kanska ein lítil triðingur av tí, sum eitt slíkt øki hevði kostað har.

Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunu, sigur, at kommunan hevði tilsamans 25 grundøki við Lýðarsveg. Nøkur eru umbiðin, og eini sethús eru bygd. Eftir eru umleið 20 grundøkir, sum bara bíða eftir keypara, sum hevur hug at byggja og fáa tað frálíka útsýni, sum er av Lýðarsvegi.

– Hesi grunøkini eru púrasta klár at byggja á, og uppi í prísinum á 295.000 krónur eru øll íbindingargjøld, sigur Símun Johannesen.

Borgarstjórin sigur annars, at nógv lív er ikki í sethúsabygging í kommununi beint í løtuni, men onkur hús standa í gerð við Gaddavegin, har annars er um at verða fullbygt.

## Undir Nesinum

Undir Nesinum hevur Nes kommuna eisini eina verkætlan við byggiøkjum í stoypiskeiðini, og her verða eini 25 grundøkir tøk, tá tann ætlanin kann fremjast í verki.

Símun Johannesen vísir á, at fólkatalið í kommununi kvinkar spakuliga uppeftir – um enn kanska eitt sindur seint.

– Vit eru í løtuni umleið 1270 borgarar í kommununi, og vit vóna, at enn fleiri barnafamiljur hava hug at seta seg niður her hjá okkum.

Borgarstjórin leggur aftrat, at fólk eru hjartaliga vælkomin at seta búgv í Nes kommunu.



**Fyrispurningar eru**

Seinastu 15-20 árini eru rættiliga nógvir virkisbygningar bygdir á havnalagnum hjá Nes kommunu, og nú eru so eisini nakrir bygningar komnir upp at standa á nýggja ídnaðarøkinum.

– Vit fáa framvegis fyrispurningar um byggilendi til nýggj vinnuvirki, men í løtuni eru ongar heilt ítøkiligar ætlanir á pappírinum, sigur borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Vónandi letur virkið skjótt uppaftur

**- Vit hava hoyrt okkurt um, at ætlanin er at lata saltfiskavirkið á Toftum uppaftur eftir summarsteðgin, men vit vita einki við vissu, sigur borgarstjórin**

Vilmund Jacobsen

Saltfiskavirkið á Toftum var ein partur av Faroe Seafood-samtakinum, sum fór á húsagang seint í fjør heyst. Síðan virkið læt aftur fyri umleið fimm mánaðum síðan, hevur einki regluligt fiskaarbeiði verið á virkinum og fleiri av teimum, sum arbeiddu har, hava ikki verið í lønandi vinnu síðan.

Tá feløgini Vinnan, Framherji og Samherji í Íslandi keyptu fýra virkir og seks skip úr trotabúnum eftir Faroe Seafood, varð sagt, at tey virkir, sum teir fóru at lata fyrst uppaftur, vóru virkið í Saltangará – og virkið á Toftum.

Nú eru nakrar vikur, síðan latið varð upp aftur í Saltangará, men einki røkist fyri, at ein uppaftur lating á Toftum er so ógvuliga nær.

Í síðstu viku segði stjórin í felagnum, sum rekur fiskavirkið í Saltangará, Jógvan Dávid Jacobsen, at óvissa er í løtuni um rávørugrundarlagið undir virkinum á Toftum, áðrenn greiða er fingin á, hvussu nógv ísfiskaskip fara at royna eftir makreli í summar og í heyst.

Stjórin legði eisini aftrat, at tað er truplari og bindir meiri pening at starta eitt saltfiskavirki upp enn eitt vanligt flakavirki.

Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunu, harmast sjálvsagt at, at virksemi, sum var á saltfiskavirkinum á Toftum, enn ikki er komið uppaftur at koyra.

– Eg havi hoyrt okkurt um, at virkið á ætlandi letur uppaftur eftir summarfrítíðina, men vit hava onga vissu fingið fyri hesum, legði hann aftrat.

Stjórin í felagnum, sum rekur virki í Saltangará, Jógvan Dávid Jacobsen, segði, at í prinsippinum kann saltfiskavirkið á Toftum lata uppaftur í dag, um tað skal verða.

Hann tordi kortini einki at siga við vissu um, nær virksemið aftur verður á virkinum.

*vilmund@sosialurin.fo*

**» Í høvuðsstaðarøkinum hevði hetta verið eitt rættiliga bíligt byggiøki – ja, kanska ein lítil triðingur av tí, sum eitt slíkt øki hevði kostað har**

SÍMUN JOHANNESEN



*– Vit vóna, at saltfiskavirkið á Toftum letur upp aftur eftir summarsteðgin, sigur borgarstjórin*